# sínum eftirmæli



havt eitt sera tætt samstarv, og verður Levy feldur í hesum málinum, rakar tað samstundis Blair sera meint, hóast hann ikki hevur framt nakað lógarbrot.

## Teir konservativu skúma fram

Og júst sum Labour ikki hevði tørv á fleiri trupulleikum, lúrir enn ein brotasjógvur í havsbrúnni. Tað er konservativi leiðarin David Cameron, ið stendur serstakliga sterkt í veljarakanningum.

Spurningurin er, um Gordon Brown kann basa tí konservativu bylgjuni, sum styrknar alsamt. Hjálp frá Blair fær hann onga, tí hann hugsar meira um eftirmælið enn um framtíðar politiskar ætlanir.

Eingin ivi er um, at Blair hevur broytt Bretland, og við kønari hond hevur hann saman við Brown skapt framúrskarandi úrslit seinastu tíggju árini. Spurningurin er, um vit fara at minnast Blair sum forsætisráðharran, ið ikki bert moderniseraði Labour og stjórnina, men eisini sjálvt Bretland og fólkasál tjóðarinnar, ella um vit fara at minnast hann sum mannin, ið viltist í irakisku oyðimørkini, og at enda varð vrakaður av bretska fólkinum.

Keldur:
The Guardian, 28. februar 2007
Newsweek, 26. februar 2007
Weekendavisen